# Jónhard spældi seg í hitan

**Landsliðsvenjarin sá síðsta sunnudag Atla Danilesen vinna tvídystin á miðvøllinum ímóti Súna Olsen, sum heilt víst verður á vongverjanum í Sveis. Nú umhugsar venjarin, hvat hann skal gera við KÍ liðformannin**



*Ímóti Malta spældi Jonhard seg í landsliðshitan*

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Henrik Larsen, landsliðsvenjari, var síðsta sunnudag í Gøtu og hugdi at GÍ og KÍ. Ivaleyst hevur hann við egnum eygum vilja fingið staðfest, um hann skal hugsa meiri um møguleikan, sum varð nevndur undan heimadystinum ímóti Malta. Tann møguleikin var, at Súni Olsen kanska átti at havt verið royndur longri frammi á vøllinum.

Tá ið landsliðsvenjarin fór úr aftur Gøtu, mundi hann hava fingið svar upp á tann spurningin. Samstundis hevði tað, sum hann hevði verið eygnavitni til, birt ein nýggjan spurning, sum landsliðsvenjarin eigur at hugsa um.

Súni Olsen sannførdi ikki venjaran sunnudagin um, at hann eigur at flytast av vongverjanum í høgru og longri fram á vøllin. Tí verður Súni eisini í Sveis vongverji. Nýggi spurningurin, sum venjarin fekk at hugsa um í Gøtu, var, hvat hann skal gera við Atla Danielsen. Hann kom als ikki á vøllin, tá ið Malta og Føroyar spældu. Sum vit hava skilt tað, hevði føroyski venjarin ætlað, at allir spælararnir skuldu koma á vøllin. Men av einari ella aðrari orsøk var misskiljing komin í, so maltesarnir ikki vóru greiðir yvir hetta, og í síðsta enda lupu Atli Danielsen og Kári Nielsen av, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Bæði Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen hava áður sæð, at tað er dugur í Atla Danielsen, og sunnudagin sá landsliðsvenjarin, at KÍ liðformaðurin greitt vann tvídystin við skotsterka gøtumannin, Súna Olsen. Atli Danielsen vísti sannførandi avrik. Spurningurin er so, um tað verður pláss fyri honum millum teir fyrstu ellivu. Hann man standa frammarlaga, um venjarin hugsar um at gera broytingar.

Fróði Benjaminsen, sum bæði er bóltvinnari og ein fínur fótbóltsspælari, verður neyvan fluttur av sentrala miðvøllinum. Í stórum avbjóðingum sum teimum ímóti Sveis á útivølli og Fraklandi á heimavølli, er Julian Johnsson hentur. Eingin megnar at renna so nógv sum hann, og serliga síðstu løtuna er hann hvørja ferð eyðsýndur um bóltvinnari.

Nú hevur Henrik Larsen úttikið teir átjan, sum hann vil hava við til Sveis, og ivaleyst fer hann undir venjingunum í Sveis at føla seg eitt sindur fyri og hava eitt vakið eyga við, um nú broytingar skulu gerast, og um tað, sum hann sá Atla Danielsen útinna í Gøtu, kanska kann nýtast í altjóða uppgávu. Tað er upp til venjaran at gera av.

### Jónhard í hitanum

Tað er ikki talan um kollveltandi broytingar, nú landsliðsvenjarin hevur boðsent teimum átjan, sum hann vil við til Sveis. Tað var heldur ikki roknað við kollveltandi broytingum, og soleiðis eigur tað heldur ikki at vera.

Upprunaliga var Jónhard Frederiksberg ikki úttikin til dystin ímóti Malta. Tá ið tað dystarmorgunin var greitt, at Todi Jónsson kortini ikki fór at verða førur fyri at gera come back, vórðu boð í skundi send eftir Jónhardi. Hann slapp at royna seg í ein hálvan tíma, og venjarin man hava mett avrikið at vera hampuliga gott. Jónhard er í hvussu so er biðin aftur.

Todi Jónsson roknaði ikki við, at lítli løsturin, sum var orsøk til, at hann ikki var førur fyri at spæla ímóti Malta, fór at halda honum leingi frá fótbólti. Seinnapartin í fyrradagin vandu Todi og liðfelagarnir í FCK fyri fyrst ferð, eftir at arbeiðssteðgurin í donskum fótbólti var av, og landsliðsvenjarin hevur enn eina ferð sent boð eftir fyrrverandi liðfelaganum hjá sær í FCK. Allir hinir útisetarnir í donskum fótbólti, sum hava verið raktir av arbeiðssteðgi í eina viku, hava eisini fingið landsliðsboð. Tað ber við sær, at Kári Nielsen, sum fyrr í ár fyri fyrstu ferð var á landsliðnum, og sum á oddaliðnum HB hevur fingið alt størri leiklut á miðvøllinum, í fyrstu atløgu er uttanfyri átjan manna hópin, sum fer av landinum mikudagin.

Teir átjan, sum eru boðsendir at umboða Føroyar í fyrsta undankappingardystinum, har málið er HM endaspælið í Týsklandi í 2006, eru Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, sum eru málverjar. Útispælararnir eru Pól Thorsteinsson, Jón Rói Jacobsen, Óli Johannesen, Johan B. Hansen, Súni Olsen, Jákup á Borg, Jann Ingi Petersen, Julian Johnsson, Atli Danielsen, Fróði Benjaminsen, Rógvi Jacobsen, Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum, John Petersen, Jónhard Frederiksberg og Todi Jónsson.



*Eftir at hava sæð Atla Danielsen í Gøtu eigur landsliðsvenjarin at umhugsa, hvat hann skal gera við KÍ-liðformannin*

# Søren Olsen høvuðsvenjari hjá Ægir

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Seinasta vikuskiftið skrivaði Søren Olsen undir sáttmála, og hann verður harvið høvuðsvenjari hjá svimjifelagnum Ægir. Formaðurin hjá Ægir, Dann Mikkelsen, er stak væl nøgdir við at fáa Søren Olsen aftur til Klaksvíkar at standa fyri allari venjingini hjá Ægir.

Søren hevur verið venjari fyri svimjifelagið Skeggjar í fleiri ár, og hevur hann fingið góð úrslit har. Søren er gamal Ægir svimjari, so alt talar fyri at tað verður eitt gott samstarv, tí sum gamal kenningur, kennur hann umstøðurnar væl, og tað hevur nógv at siga.

Teir yngru svimjararnir byrja at svimja í komandi viku. Eisini her eru royndir venjarar og svimjingin hjá teimum er mánadag og mikudag. Motiónsliðið byrjar at svimja 5. september.



*Søren Olsen, vinstrumegin, er vorðin nýggjur høvuðsvenjari hjá Ægir. Her avmyndaður saman við formanninum í Ægir, Dann Mikkelsen*



# Minipiltarnir hjá VB fingu gull

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Hesir garparnir hjá VB vunnu fyri sløkum tveimum vikum síðani AB-kappingina, sum var á Argjum.

Fyrsti dysturin hjá teimum var ímóti b-liðnum hjá AB, og har vunnu vágbingar 17-0. Næsti dysturin var ímóti a-liðnum hjá sama felagi, og hesin dysturin var javnari, men VB vann ein tepran 2-1 sigur.

Tað forvitnisliga er, at allir dreingirnir á liðnum ganga í sama 2. flokki í Vágs skúla uttan Salmund, sum gongur í Porkeris skúla.



*Aftara rað frá vinstru eru teir: Eyðbjørn, Sjúrður, Aron, Simon og Anders, sum er venjari.*
*Fremra rað frá vinstru eru Teitur, Tóki, Búi og Salmund*

# Fimleikaárið stendur fyri framman

**Sunnudagin 29. august verður tilmelding hjá Havnar Fimleikafelag í høllini á Stórheyggi**



*Havnar Fimleikafelag fer nú undir vetrarvirksemi sítt*
*Savnsmynd*

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Nú mánadagin byrja venjingarnar í Havnar Fimleikafelag og verður tí skipað fyri tilmelding sunnudagin frá kl. 15:30 til kl. 17. Av tí at talan er um størsta fimleikafelag í landinum er sjálvsagt avmarking á øllum liðum. Men er onkur, ið ikki fær møtt á Stórheyggi, ber til at ringja í høllina frá kl. 16:30. Limagjald verður goldið, tá ið meldað verður til.

Havnar Fimleikafelag hevur breiða undirtøku og fevna venjingarnar tískil frá smáum børnum, umvegis úttøkuliðum, til bæði eitt og tvey ættarlið eldri. Undirtøkan fyri "Kom í Form" er sjón fyri søgn, at felagið hevur rakt seymin á høvdið. Kostnaðurin at luttaka á ymsu liðunum er ymiskur alt eftir hvørjum aldri og liði, tú luttekur á. Kostnaðurin er úr 350 upp til 600 krónur, men luttekur tú á fleiri liðum, verður goldið fyri eitt lið og síðani 200 krónur fyri hvørt lið afturat.

Felagið er tó longu farið til verka við inspiratiónsskeiðum og komandi vikuskifitið verður Pilatesskeiðið, ið Hanna Dalsgarð undirvísir í.

Fyri at tryggja øllum fimleikarunum góða frálæru, skulu sjálvsagt nógvir venjarar til og teir flestu eru venjarar, ið traðkað til ár eftir ár. Hetta tryggjar kontinuitet og gevur felagnum tryggleika at seta nógvar venjingar út í kortið.

Afturat teimum venjarum felagið hevur, er Havnar Fimleikafelag eisini ógvuliga fegið um, at tvey kend nøvn somuleiðis hava játtað at verða venjarar komandi vetur. Høgni Rúnason Øster og Sóleyð Ísaksdóttir eru millum teirra, ið hava traðkað barnafimleikaskógvar í Havnar Fimleikafelag, síðani hava tey roynt seg uttanlands og leita nú heim aftur til felagið.

Høgni Rúnason Øster fer komandi vetur at undirvísa eldru kappingarliðunum í reiðskapi, meðan Sóleyð Ísaksdóttir undirvísir í Pilates, Styrki og konditón, Yoga og avspenning, Modernaðum dansi, eins væl og í Hip Hop.

Havnar Fimleikafelag spennir víða, og tískil verður skipað fyri nógvum øðrum tiltøkum, ið á ymsan hátt hava samband við fimleik. Nevnast kunnu til dømis rútmukappingin 27. november og amboðskappingin, ið verður í januar. Stuðulsrenningin (5. mars. 05) er tiltak, ið vaksandi undirtøka er fyri og sjálvsagt verða bæði loppumarknaður á Stórheyggi (30. oktober 04) og tiltak í SMS (13. nov. 04).

Tó er serligt fyri hetta fimleikaárið, at Havnar Fimleikafelag hevur 95 ára føðingardag. Slíkur føðingardagur sæst sjálvsagt aftur í vetrarhálvuni og verður kunnað um hetta seinni. Dagurin 11. desember 2004 er settur í skránna, so kunningin um tiltøk í sambandi við føðingardagin verða á prenti áðrenn november-mánaður er runnin.

Fimleikaframsýningarnar 12. og 14. mars vísir áskoðarunum part av tí, fimleikararnir hava tikist við um veturin og sigast kann, at støðið í framsýningunum er hækkað munandi seinastu árini. Frá tí, at áskoðarar fingu ófrið á seg, tí skráin kanska var heldur drúgv, eru framsýningarnar settar saman í heild, soleiðis at áskoðarin verður undirhildin frá byrjan til enda.